# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

**Bilradio á Rás2** · hósdagin kl. 16.05

*Í sendingini er samrøða við Petur Hermansen, danska FTZ-stjóran Jens Sørensen og blaðstjórin á danska fakblaðnum Motormagasinet, Michael Nørfelt*



*Tveir veteranar í føroysku bilbransjuni: Andreas M. Andreasen (AMA) og Jógvan Hans Joensen úr Miðvági*

# 200 fólk vitjaðu hjá FTZ

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin og leygardagin í síðstu viku var skipað fyri eini fak- og vørumessu hjá FTZ-Billutir & Amboð í Fútalág í Havn.

Fleiri av starvsfólkunum hjá FTZ Autodele & Værktøj A/S í Danmark vóru við hesar dagar og sýndu fram og vóru um kundarnar. Eisini var stórin Jens Sørensen við í ferðalagnum.

Føroysku FTZ-stjórarnir Vagnur Johannesen og Ragnar Joensenlata lata væl at tiltakinum. Umleið 200 fólk vitjaðu, og nógv tóku av serligu tilboðunum, sum vóru sýnd fram hesar dagar.

FTZ Autodele & Værktøj A/S er størsta heilsølufyritøkan í Danmark innan eykalutir og amboð til bilar. Fyritøkan hevur í løtuni 47 deildir í Danmark og 800 fólk í starv. Árligi umsetningurin er umleið 1,2 milliardir krónur. FTZ Autodele & Værktøj A/S keypti í fjør meirilutan av Sp/f AMA í Havn og eykalutadeildini hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.



*Vagnur Johannesen og Ragnar Joensen, stjórar hjá FTZ í Føroyum*






*Jens Sørensen er stjóri í FTZ Autodele & Værktøj A/S, sum er størsta heilsølufyritøkan í Danmark innan eykalutir og amboð til bilar við 800 fólkum í starvi og einum umsetningi upp á umleið 1,2 milliardir krónur*